# Hans Petur vann tónleikakapping

**Hans Petur í Brekkunum vann kappingina hjá Tórshavnar Stórband um at skriva tónleik til big band. Sunnudagin var konsert við frumframførslu av sjey føroyskum tónleikastykkjum til big band**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Sunnudagin endaði tónleikakappingin hjá Tórshavnar Stórband um at skriva verk til big band. Sjey føroyingar royndu seg í kappingini, og øll verkini vórðu spæld á konsert í Norðurlandahúsinum.

Tá varð eisini avdúkað, hvør hevði vunnið kappingina og tær 30.000 krónurnar. Ein norskur og ein danskur dómari høvdu mett um øll verkini, og teirra niðurstøða var, at Hans Petur í Brekkunum skuldi vinna kappingina. Nummar 2 gjørdist Magnus Johannessen.

### Amerikanskt og norðurlendskt

»Oman á sand, brenna bál« eitur stykkið hjá Hans Peturi, og tónleikurin er bæði lívligur og friðarligur.

– Eg havi fingið íblástur úr amerikanskum jazzi, men eg haldi eisini, at tónleikurin ljóðar norðurlendskur, sigur Hans Petur í Brekkunum.

Hans Petur í Brekkunum er útbúgving á Konservatoriinum í Århus, og hann hevur undirvíst í tónleiki í nøkur. Nú býr hann í Keypmannahavn, har hann fæst við at skriva og spæla tónleik burturav.

– Í løtuni undirvísi eg ikki, og so leingi, sum eg kann klára meg við at spæla og skriva tónleik, ætli eg mær at halda fram við tí, sigur Hans Petur í Brekkunum.

### Fingu føroysk verk

Tað er lítið av big band tónleiki skrivaður av føroyskum komponistum, og høvuðsendamálið við kappingini hjá Tórshavnar Stórband var júst at fáa nøkur føroysk verk at spæla.

Hetta má sigast at eydnast, tí heili sjey verk komu til kappingina.

Og vinnarin í kappingini hevur hug at skriva meira til stórband.

– Eg havi havt eitt hugskot um at skriva tónleik til eina heila konsert við einum stórbandi, og tað hugskotið verður kanska veruleiki í nærmastu framtíð, sigur Hans Petur í Brekkunum.



*– Eg havi havt eitt hugskot um at skriva tónleik til eina heila konsert við einum stórbandi, og tað hugskotið verður kanska veruleiki í nærmastu framtíð, sigur Hans Petur í Brekkunum*

# Countryfestivalur í Vestmanna



**Tá summarfestivalarnir eru av, bjóða vestmenningar til countryfestival. Leygardagin 17. september verða Føroya fremstu countrytónleikarar at hoyra í Vestmanna, sum hendan dagin og náttina við verður broytt til ein countrystað burturav við tónleiki, dansi, mati og øðrum countryundirhaldi**

FESTIVALUR

Tann kendasti føroyski country-sangurin, »Eg siti so eina«, hevur sín uppruna í Vestmanna, har countrytónleikurin altíð hevur trivist væl. Vestmenningurin, Hallgrím Miðberg, yrkti sangin í seksti-árunum, tá country- og rokktónleikurin blómaði í bygdini.

Nógvir tónleikabólkar úr Vestmanna hava millum ár og dag lagt dent á at spæla country, og 17. september verður skipað fyri countryfestivali í bygdini, har tónleikur, dansur, góður matur og annað country-undirhald verður á skránni allan dagin og náttina við.

Countryfestivalurin er ætlaður sum eitt afturvendandi tiltak tíðliga um heystið fyri ikki at órógva summarfestivalarnar og stevnurnar. Enn er ikki heilt greitt, hvørjir sangarar og tónleikabólkar verða við, men meira fæst at vita um hetta seinni í summar, tá skráin verður endaliga løgd.

Ein arbeiðsbólkur, sum javnan hevur skipað tiltøk fyri VÍF og onnur feløg í Vestmanna, fyrireikar festivalin. Í ár hevur bólkurin valt at lata avlopið av tiltakinum fara óskert til Vestmanna Talvfelag.

# KBI í nýggjum handli

Leygardagin læt KBI í Klaksvík upp í nýggjum handli á Borðoyarvík. KBI hevur hildið til í einum gomlum bygnini á vestaru bryggju í Klaksvík, men nú er umstøðurnar blivnar nógv betur í tí nýggja bygninginum, sum stendur eitt hanagleiv frá Norðoyatunlinum.

KBI selir Castrol-olju, amboð, eykalutir til skip og annað.

Nógv fólk vóru inn á gólvinum í nýggja handlinum, tá ið hann læt upp leygardagin, og stjórin í KBI, Karl Birgir Isaksen, fegnaðist um, at fyritøkan nú hevur fingið góðar umstøður at arbeiða undir.



*Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, klippir snórin til nýggja handilin hjá Karl Birgir Isaksen*

*Myndir: Bárður*



*Nógv fólk stukku inn á gólvi í nýggja handlinum hjá KBI í Klaksvík*



*Astrid og Jógvan Gerðalíð fáa sær eitt prát við borgarstjóran í Klaksvík*